## Toyota til Ruslands



Japanska bilverksmiðjan Toyota Motor Corp. skal byggja eina bilverksmiðju í russiska býnum Sankta Patursborg upplýsir japanska tíðindastovan Kyodo. Toyota verður fyrsti japanski bilframleiðari, sum fer at framleiða bilar í Ruslandi

*Kelda: Motor Magasinet*

## Saab best nakkapútur



Enska tryggingarstovnurin Thatham hevur givið nakkapútunum í Saab 9-3 SportSedan besta karakter í eini umfatandi test av 114 ymiskum bilum á evropeiska marknaðinum

*Kelda: Motor Magasinet*

## V6 turbodiesel



Peugeot 607 fæst skjótt við sínum higartil største HDi turbodiesel motori, sum er ein 2,7 litur V6 við 204 hk. Motorurin, sum er gjørdur í samstarvi við Ford, er eitt stórt framstig innan kvikar og umhvørvisligar dieselmotorar

*Kelda: www.bilpriser.dk*



*Mazda MX-Crossport er ein konseptbilur, sum hevur heimspremieru á bilaframsýningini í Detroit í januar 2005*

Mazda MX-Crossport:

# Spennandi konseptbilur frá Mazda



*Kabinan er sportslig og snøgg við góðum plássi til fýra vaksnar persónar og teirra viðføri*

**Mazda sýna nú fyrstu myndirnar av konseptbilinum MX-Crossport, sum hevur heimspremieru á bilaframsýningini í Detroit frá 15. - 23. januar 2005. Endalig avgerð er ikki tikin enn, um bilurin skal framleiðast**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mazda MX-Crossport er ein sonevndur Crossover, t.v.s. at bilurin er ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum. Hann hevur t.d. nakað av sportsvognseginleikunum hjá t.d. Mazda RX-8 og eisini fleiri SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikar.

Í mun til longdina (463 cm) er MX-Crossport rættuliga breiður (193 cm), hæddin er 163 cm. Bilurin er lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum og við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu (279,5), kemur hann at liggja væl á vegnum.

Designarnir hava lagt seg eftir at MX-Crossport skal líkjast Mazda RX-8 innan. Úrslitið er ein sera snøgg og sportslig kabina við góðum plássi til fýra vaksnar persónar og teirra viðføri.

Í tíðindaskrivi frá Mazda eru ongar tekniskar upplýsingar, men væntandi verður talan um sportligan undirvogn og kvikar og sportsligar motorar.

Bilaframsyningin í Detroit í januar kemur at vísa, hvussu stórur áhugin er fyri bilinum. Eftir tað verður so avgerð tikin um MX-Crossport skal framleiðast.



*MX-Crossport er lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu og stórum hjólum*